# Eitt kvøld í dansinum



## Fakta

**So nógvar røddir**
Eyðun Nolsøe, 2007
Framleitt hevur Hans Poulsen
Tónleikarar: Óli Poulsen, James Olsen, Hans Petur í Brekkunum, Tróndur Enni, Jákup Zachariassen og Pætur við Keldu

**Liggur har alføgur fín! Soleiðis syngur Eyðun Nolsøe um dóttrina í eini framúrskarandi vögguvísu, á hansara nýggju fløgu. Og soleiðis kundi eisini verið sagt um ta nýggju fløguna, sum bæði er væl framleidd, ein fragd fyri oyrað og eitt frískt lot inn í tann fámenta føroyska poppin, har tað ikki er hvønn dag, at góð og løtt løg koma undan kavi**

## Ummæli

**Theodor E. D. Olsen**
theodor@sosialurin.fo

Hesi seinastu vikuskiftini hevur Eyðun Nolsøe verið á konsertferð í Føroyum. Við sær hevur hann havt nakrar av Føroya frægastu tónleikarum, og teir hava ikki verið ikki ørindaleysir. Í skjáttuni hava teir sjálvandi havt løgini frá tí nýggju fløguni hjá Eyðuni, "So nógvar røddir". Ein fløga við 10 nýggjum sangum.

Og lat tað verða sagt beinanvegin, at tað er ein fragd aftur at hoyra málið á Eyðuni Nolsøe.

Hóast tað kanska ikki er vert at taka upp á tungu, so er tað gott at hoyra, at hann hevur lagt tað absurda kjakið frá Prix Føroyum fyri nøkrum árum síðani aftur um seg. Hendan kappingin, sum sambært endamálsorðingini skuldi geva føroyskum tónleikarum møguleika at framføra egin løg á eini professionellari konsert, varð av fleiri mett sum ein talentkapping, og tí fingu bólkar við sangarum, sum m.a. sungu rættiliga falskt, í summum miðlum betri skotsmál enn t.d. Eyðun Nolsøe, sum varð skýrdur ikki at vera nóg nýskapandi. Men hvat er at vera nýskapandi, kunnu vit spyrja?

Í 2005 gávu Frederik Sjernfelt og Søren Ulrik Thomsen út ta lítlu bókina við tí alinlanga heitinum "Kritik af den negative opbyggelighed". Har gera teir partvíst upp við tankan um, at bara okkurt er provokerandi, so er tað í sær sjálvum góð list. Ein slík útsøgn kann kanska vera provokerandi í sær sjálvum. M.a. varð í eini samrøðu við høvundarnar víst á, at hóast John Lennon kanska eksperimenteraði meira enn Paul McCartney í The Beatles, so ber til at spyrja, um Lennon hóast tað skapaði størri list enn McCartney? Er t.d. fyrra helvtin av "A Day in the Life" størri list enn "Yesterday"?

### Latið í lekkran ljóðbúna

Fløgan "So nógvar røddir" kann nokk ikki verða flokkað beinleiðis í kategoriina "nýskapandi". Hon inniheldur nakað, sum eftirhondini tíverri kann tykjast gamaldags, men tó forkunnugt á tí føroyska tónleikapallinum í dag, nevniliga sera góð løg – ja, góðar melodiir, fyri at brúka tað orðið.

Eyðun hevur skrivað øll løgini og tekstirnar sjálvur, uttan tað eina, har hansara gamli makkari, Terji Rasmussen, eisini hevur havt ein fingur við í spælinum.

Sum heild riggar fløgan kortini væl sum ein samansett poppheild.

Tey flestu løgini sita, sum tey skulu, og eru vælkomponerað. Eyðun hevur valt púra rætt, tá hann hevur heitt á tann unga framleiðaran, Hans Poulsen, um at lata løgini í hansara lekkra ljóðbúna. Hans Poulsen hevur longu á fleiri útgávum víst, hvat hann dugir, og serliga megnar hann at hava eina ávísa variatión og hugflog í produktióni, so at tær einastu endurtøkurnar eru at hoyra í sjálvum lagsmíðnum hjá Eyðuni.

### Frá fiólleikara til fólkaogn og fjakkara

Tað er ikki nógvur politikkur ella samfelagskritikkur at hoyra á hesi fløguni eins og teimum gomlu løgunum hjá Frændum, ið eru fólkaogn. Men hóast romantikkurin eigur ein stóran part, so verða t.d. rúsevni og bohematilverur eisini lýst á ein trúverdugan hátt.

Eyðun er kortini ikki tað sama sum Frændur, har hann byrjaði sína leið sum tónleikari, m.a. sum fiólleikari, og tað er heldur ikki vist, at júst tað at gerast fólkaogn er eitt beinleiðis kriterium í sær sjálvum, hóast talan er um reindyrkaðan popp.

At taka nakað ávíst lag framum er tí kanska ikki heilt rætt, og tað er eisini ilt at meta, um nakað av hesum løgunum á "So nógvar røddir" fer at fáa sama status sum sum t.d. tey góðu, gomlu romantisku løgini frá 80'unum – og fløguni við sama navni hjá Frændum. Tað fer tíðin at vísa - um tey bara halda eitt kvøld í dansinum ella fara at vara alla tíð, um vit læna eina orðing frá Eyðuni sjálvum.

Nøkur løg á nýggju fløguni eru tó serliga verd at nevna.

Sterkasta sangurin á "So nógvar røddir" er helst tann um ein tann sterkasta kærleikan, nevniliga kærleikan til dóttrina hjá Eyðuni. Vögguvísan "Skattur mín" er sætta skering og fangar beinanvegin. Hon er sangbær,